## Føðingar



8. juni vórðu Gunn Elin og Kristian Olsen úr Hovi, búsitandi í Ålesund, for-eldur at lítli Linus. Hann vigaði 4280 gr og var 54 cm langur.



13. juni fingu Hildur, Hákun og Erlendur Háfoss úr Tórshavn eina lítlasystur. Hon vigaði 3750 gr og var 54 cm long.



14. juni fingu Sunva Eysturoy Lassen og Poul Jens Lassen, Tórshavn, eina dóttur. Hon vigaði 2880 gr og var 52 cm long.

9. juni fingu Jóna Pállsdóttir Jacobsen og Pætur Dam Jacobsen, Skála ein son. hann var 54 cm langur og vigaði 4100 gr.

12. juni fingu Sára Skylv Reinert og Arngrím S. Thomassen, Sandavágur eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3590 gr.

Tann 12. juni fingu Rúna Niclasardóttir Rasmussen og Jesper Svenningsen, Keypmannahavn, ein son. Hann vigaði 3000 gr. og var 50 cm langur

13. juni fingu Kristina og Ronnie Háfoss, Torshavn eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3750 gr.

13. juni fingu Bertha og Bassi Haraldsen, Fuglafjørður eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3550 gr.

14. juni fingu Osbjørg Eysturberg og Janus Sørensen, Hoyvík eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3350 gr.

14. juni fingu Joan Heinesen og Bárður Háberg, Hoyvík ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3500 gr.

14. juni fingu Johanna og Jan Egholm, Tórshavn ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4400 gr.

14. juni fingu Rakul og Jóan Petur á Stongunum, Tórshavn eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3600 gr.

15. juni fingu Halgerð Andreasen og Jonn Arne Haraldsen, Miðvágur eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3600 gr.

17. juni fingu Hertha og Martin Kúrberg, Eiði eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3300 gr.

### Nøkur minningarorð um

# Óluvu Hentze úr Skúgvi

Sunnudagin 7. juni komu deyðsboðini um Óluvu. Fyri okkum, ið kendu Óluvu væl og stóðu henni nær, komu boðini ikki óvæntað, tí vit vistu hvussu hættisliga sjúk hon var. Óluva bar sjúku sína við einum ómetaligum stórum tolsemi, men eingin ivi mundi vera um, at hon til síðst væl visti, hvør ið fór at vera við yvirlutan, og sárur er saknurin, nú ið hon er farin.

Óluva varð fødd og vaks upp í Skúgvi. Ein av útoyggum okkara, sum í barna- og ungdómsárum hennara var rættiliga avskorin og uttan iva man tað vera so, at hetta einsemi í ein vissan mun hevur elvt til sjálvsálit og sjálvbjargni. Tí bæði sjálvsálit og sjálvbjargni eyðkendu Óluvu.

Onkuntíð kundi tykjast, at hon heldur átti at verið ein harðbalin drongur enn ein vanlig genta. Ikki so sjálvdan í lundatíð á hásumri sást Óluva koma klintrandi niður ígjøgnum Skortaliða við lundastong í hendi, tók rókina omanfyri Navatanga, og helt so eftir rásini vestur ígjøgnum niðaraberg og kannaði, um ikki onkur lundasessur var tøkur. Teir eru allir niðast í upsini, har steyrrætt berg er niður í sjógv.

Somuleiðis var í líratíð. Henda veiða fer fram á náttartíð við lummalykt í kolasvartari niðu. Men hesum umstøðum firnaðist Óluva ikki fyri. Tí hetta skuldi eisini roynast.

Beiggi hennara lat gera ein fittan árabát. Níggju alin var hann ímillum stavnarnar, so støddin hevur verið á



leið sum á tríbekki. Ikki so sjálvdan fekk hon onkran at hjálpa sær við at flota bátin, so hon kundi nýta kyrrindini og fáa eitt kók. Hetta var í hennara ungdómsárum.

Soleiðis var eisini hendan dagin, ið eg til stuttleika kann nevna. Veðrið var av tí besta, og snimma á morgni var ein av okkara bestu útróðramonnum farin á flot við sínum stóra og vælútgjørda báti og helt vestur í Sandshavið. Hann sigldi mið á miði henda góða dag, men veiðan gjørdist tveir brosmukálvar og nakrir fáir smáseiðir. Langt út á seinrapartin kom hann aftur at landi, og sum vanlig er á slíkum plássum, vóru altíð fleiri hendur, ið hjálptu til at fáa bátin aftur á støðna. Veiðina vildi eingin nevna, men tá ið hann vendi sær á, og sær eina fitta fiskarúgvu liggja á helluni undir skutinum á hesum tríbekkinum, spurdi hann um nakar hevði verið á floti. Jú, var svarið, Óluva hjá Kjartan, hevði verið út fyri landi um kyrrindini. Hvussu orðini fullu minnist eg ikki, men hann helt hetta vera eina undarliga verð.

Í 1997 kom Óluva í kirkjuráðið í Vesturkirkjuni. Og tá ið Mary Persson legði frá sær sum kirkjuverji, valdi kirkjuráðið Óluvu í hennara stað. Og í hesum starvi hevur Óluva víst sama lyndi og sama arbeiðssemi. Hennara lutur lá ongantíð eftir. Tað ið hon játtaði at gera, varð gjørt. Altíð væl uppløgd og við einum smíli. Vit, ið enn eru í kirkjuráðnum í Vesturkirkjuni koma at sakna Óluvu ógvuliga nøgv. Tað, ið varð lagt í hennara hendur at taka sær av, var altíð í góðum hondum.

Góðu tit, Hendrik, Tórður og Sjanna. Størstur er saknurin og missurin hjá tykkum, men lati ikki sorgina taka alla tykkara lívsgleði og megi, men líti á Harran og biði hann um hjálp og styrki. Tey ráðini hevði Óluva eisini givið tykkum.

Friður verið við minninum um Óluvu.

**Sjúrður**

## Rætting

Mánadagin høvdu vit eina mynd í blaðnum av teimum, sum tóku prógv á Føroya Maskinmeistaraskúla í 1959. Eitt eftirnavn kom skeivt fyri, maðurin á myndini er ikki Einar Joensen, men Einar Djurhuus. Vit biðja orsaka mistakið.

*-red*







## Andlát og jarðarferðir

**Bent Effersøe** andaðist mikudagin í Keypmannahavn, 84 ára gamal. Jarðarferðin verður týsdagin klokkan 11.30 úr Højdevangskirken, Irlandsvej 45 í Keypmannahavn.

### 80 ár

Fríggjadagin 10. juli fyllir Palma Solmunde, Kambsdalur 80 ár. Dagurin verður hildin heima á Kambsdali millum 10-15. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### 90 ára føðingardagur

Mánadagin 22. juni verður Gunnar Andreasen á Eiði 90 ár. Dagurin verður hildin saman við børnunum við familju.

### Prógv

Tann 30. januar fekk Rúna Niclasardóttir Rasmussen úr Havn prógv sum cand.ling.merc. í evropiskum lestri og týskum á Handilsháskúlanum í Keypmannahavn

**Dagurin**
**19. juni. Gervasius**, deyður umleið ár 300. Gervasius og bróðirin Protasius vórðu tiknir av døgum í Milano.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*